# Gomul mynd úr Klaksvík

Myndin er tikin í august 1949 í sambandi við at danin Dr. Vagn Stærmose, sum var yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og kommunulækni, var deyður. Minningarhald er í sjúkrahúsgarðinum, áðrenn kistan fór av landinum. Hann varð grivin í Danmark.

Sjúkrasystrar standa rundan um kistuna og presturin, helst Niels Rasmussen, standur á trappusteininum. Nógv fólk eru komin saman til minningarhaldið. Vinstrumegin situr orgulspælarin. Á flaggstongini er Dannebrog í hálvari stong. Á skeltinum stendur ”Vitjunartíð frá kl. 3-4”.

Dr. Stærmose var ein sera væl umtóktur lækni. Hann noyddist ofta at fara til útoyggjarnar við læknabátinum "Medicus". Ikki var altíð so tespiligt at fara í læknaørindi í óveðri, og nógv varð lagt fyri, tá ið læknahjálp var fyri neyðini. Hann var eisini skúlalækni í Klaksvík, og plagdi hann at vitja skúlan at kanna børnini, tá ið okkurt serligt var á vási, umframt at hann eisini var lækni hjá hermonnunum undir krígnum.

Dr. Stærmose var giftur við Helenu, dóttir Sofiu, f. Hansen, og Alexander Enniberg, lærara, í Klaksvík. Tey fingu dóttrina Karen, sum býr í Danmark.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at ringja til Sosialin á tel. 341844 ella 216135.



*Dr. Vagn Stærmose*

# Framsýningin byrjar við kvøldsetu

Jórunn Dánjalsdóttir, sum skipar fyri stóru myndaframsýningini ”Realskúlaframsýningin 1916-66”, er byrjað at hanga myndir upp í Kommunuskúlanum í Havn.

Á framsýningini verða umleið 500 myndir av næmingum og lærarum í Færøernes Mellem- og Realskole frá 1916 til 1966.

Framsýningin byrjar við kvøldsetu í auluni í Kommunuskúlanum mánakvøldið 23. juli kl. 19, har borgarstjórin setur framsýningina og fyrrverandi næmingar siga frá um skúlatíðina. Annars verður framsýningin opin soleiðis: 24. til 31. juli frá kl. 15–20, 1. til 4. august frá kl. 10-20, og 5. august frá kl. 15-20.



*Jórunn Dánjalsdóttir er byrjað at hanga tær umleið 500 myndirnar upp í Kommunuskúlanum í Havn*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Sosialurin
Bilar Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur Nøvn Skráir

†

**Trúgvi Kvilt**

andaðist í Frederikshavn 11. juli, 56 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju hósdagin 19. juli. kl. 14.00

# Næmingar úr Fuglafirði sýna fram á G

Meðan G-fagnaðurin er, fara Næmingar úr Fuglafjarðar skúla stilla út málningar í Gallerí Tøting. Teir hava gjørt hesar málningar undir heitinum pop-art í skúlaárinum 06/07. Hetta eru næmingar úr 6. b, 8. og 10. flokki. Framsýningin letur upp hósmorgunin kl. 9:00.




## Dagurin

**19. juli. Justa**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hon og systirin Rufina, beindu fyri skurðgudamyndini Salambo í Sevilla Spaniu. Tær vórðu báðar píndar og tiknar av døgum. Navnið merkir tann rættvísa.

## Prógv

Tann 29. 06. 2007 hevur **Lena Lambaa,** Fuglafjørður, fingið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur frá CVU – Lillebælt í Odense

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Trúgva Kvilt** kemur í Skála kirkju í kvøld umleið klokkan 22. Jarðarferðin verður úr Skála kirkju hósdagin klokkan 14.

Kistan við **Berint Berthelsen** kemur í Sjóvar kirkju hóskvøldið klokkan 19.
Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju fríggjdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Berint kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konto í peningastovunum.